# Bretland sinnað at tosa um dupultskattaavtalu

**Skattamyndugleikarnir í Bretlandi taka væl móti føroysku áheitanini um at fáa í lag samráðingar um eina dupultskattaavtalu**

SKATTAMÁL
*Tíðindaskriv*

Gongd er nú komin á arbeiðið at fáa í lag eina dupultskattaavtalu við Bretland. Minni enn ein mánað eftir, at landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, Bárður Nielsen, heitti á bretsku skattamyndugleikarnar um at koma til samráðingar um eina dupultskattaavtalu, er eitt positivt svar komið úr Bretlandi.

Í einum skrivligum svari frá bretska skattavaldinum verður staðfest, at bretar eru sinnaðir at kanna møguleikan fyri einari dupultskattaavtalu við Føroyar. Bretsku skattamyndugleikarnir, sum halda til í London, heita eisini á føroyska landsstýrismannin um at koma við einum uppskotið til dupultskattaavtalu.

- Vit taka væl ímóti áheitanini, og embætisfólk í Fíggjarmálaráðnum fara nú at tilevna eitt sáttmálauppskot. Okkara sikti er at beina allan iva um skatta-viðurskifti av vegnum, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður.

Sáttmálauppskotið, ið nú verður gjørt, skal ætlandi byggja á leistin hjá europeiska felagsskapinum OECD. Enn er ikki greitt, nær samráðingar við Bretland kunnu byrja.

- Hetta kann taka drúgva tíð, men nú er gongd komin á, og tað er at fegnast um, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður.

Hann hevur sett sær fyri at fáa Føroyum dupultskattaavtalur við lond, ið føroyingar hava nógv samstarv og samskifti við. Avtalan við Bretland er fyrsta stigið á hesi leið.

Dupultskattaavtalur hava tvey høvuðsendamál. Í fyrsta lagi skulu tær tryggja, at borgarar og fyritøkur ikki koma at gjalda dupultan skatt, tá arbeitt verður í tveimum londum. Hitt endamálið er, at borgarar og fyritøkur hava fulla greiði á skattligu avleiðingunum, tá tey taka avgerð um at fara undir virksemi í øðrum landi

# Ella Müller er forkvinna fyri Náttarravnarnar

NÁTTARRAVNAR
*Tíðindaskriv*

Náttarravnarnir í Tórshavn høvdu aðalfund 17. mars. Har var m. a. nevndarval, og nýggja nevndin hevur skipað seg soleiðis:
Ella Müller, formaður
Tone Kjeld, næstformaður
Hans Jákup Olsen,
Guðrið Rubeksen
Arni Clementsen

# Norröna kom trygt í Havn

**Eftir at hava verið úr sigling í góðar tveir mánaðir, kom nýggja Norröna aftur á Havnina mánamorgunin**

NORRØNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Vit eru sera fegin um at fáa nýggju Norrönu aftur í sigling, sigur Óli Hammer, stjóri á Smyril Line, sum var eitt av ferðafólkunum sum komu við Norrönu, tá hon trygt legði at bryggju í Havn mánamorgunin.

Óeydnudagurin, tá Norröna sigldi á land tríggjar ferðir, var hin 15. januar, og hevur skipið ikki verið í sigling aftur fyrr enn nú.

– Skaðin er afturgjørd, og tað hevur alt gingið eftir ætlan, sigur Óli Hammer.

Meðan skipið kortini var á skipasmiðju er garantieftirlit gjørt, sum annars ætlandi skuldi gerast seinni – garantiið gongur út 7. apríl.




*Nýggja Norröna kom á Havnina stutt eftir klokkan mánamorgunin*

*Mynd:Álvur Haraldsen*

Óli Hammer sigur, at tað er ikki nakað stórarbeiði, sum er fevnt av garninum, men fleiri smáar ábøtur eru gjørdar.

– Vit hava havt fólk frá skipasmiðjuni við rættuliga ofta, tí nógvir smáir leysir endar hava verið, sigur Óli Hammer. Hann vísir á, at teir tóku skipið so tíðliga í sigling, og tá er altíð okkurt smáting eftir at gera.

Við Norrönu upp vóru nakað yvir 200 ferðafólk, einir 80 bilar og um hálvthundrað trailarar.

Skipari upp var Hendrik Hammer

# Gamla Norröna á helst seld í hesi vikuni

**Gongst eftir ætlan verður søluavtala um gomlu Norrönu undirskrivað í hesi vikuni**

NORRØNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Hesa ferð trúgvi eg eitt sindur meira upp á tað, tí hesir menninir tykjast rættiliga ídnir at fáa skipið.



Orðini eigur Óli Hammer, stjóri á Smyril Line, nú tað enn einaferð ljóðar, at gamla Norröna er um at verða seld.

– Vit hava havt nógvar áhugaðar keyparar umborð. Tað er altíð størri áhugi fyri einum skipi, sum er í sigling, enn einum, sum liggur í Havn, sigur Óli Hammer.

Fleiri áhugaðir keyparar hava verið við skipinum, nú tað var í sigling – og eisini nú Norröna fór úr Hanstholm til Keypmannahavnar vóru fleiri áhugaðir keyparar við.

Óli Hammer sigur, at tær ítøkjuligu samráðingarnar eru við eitt skipafelag við Miðalhavið, sum hevur fleiri skip í rutusigling.

Samráðingarnar hesaferð eru so seriøsar, at Óli Hammer væntar, at sølusáttmáli verður undirskrivaður seinni í hesi vikuni.

Heldur ikki hesaferð fær Óli Hammer upplýst søluprís – enn í øllum førum. Hann sigur, at prísurin kanska kemur fram seinni. Óli Hammer sigur kortini so mikið, at søluprísurin ikki er tann, ið tey á Smyril Line helst vildu havt.

– Men nú mugu vit sleppa av við skipið, sigur Óli Hammer.

W W W . S O S I A L U R I N . F O









